## Mennandi summarfrítíðarstarv/lestrarstarv!

Neyðhjálp Fólkakirkjunar byrjar sítt "face2face"-tiltak í Føroyum mánadagin tann 11. juli til 3. september - og okkum tørvar í tí sambandi starvsfólk yvir 18 ár.

Arbeiði vil fyri tað mesta ganga fyri seg í gøtunum í Tórshavn og arbeiðstíðin er frá **mánadegi til leygardag á vaktum á 4 tímar – antin frá kl. 10-14 ella frá kl. 14-18. Tað krevst, at ein kann arbeiða minst 2 dagar um vikuna.**

Arbeiði títt verður at kunna um arbeiðið hjá felagsskapinum og harvið at fáa í lag avtalur um føst gjøld til felagsskapin. Starvið krevur sostatt, at tú ert ein opin og fyrikomandi persónur, og at tú gongur upp í arbeiði og ikki gevur upp. Av tí at arbeiðið gongur fyri seg saman við øðrum ungum starvsfeløgum er tað eisini týdningarmikið, at tú ert ein líðspælari.

Arbeiðið hevur stóran týdning fyri nøkur av teimum fátækastu menniskjunum í heiminum samstundis sum tú fært høvi til at vinna tær royndir og umdømi innan eitt arbeiði, sum hevur stóra virðing í vinnulívinum.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, so ring til Face2face samskiparan Kenneth Kamp á (+45) 29 69 91 20.

Sosialurin 341800

Send umsókn tína til:
**Folkekirkens Nødhjælp**
Att. Kenneth Kamp Butzbach
Nørregade 13
1165 København K
ella kkb@dca.dk

FOLKEKIRKENS NØDHJÆLP
VI TROR PÅ ET LIV FØR DØDEN

# Til sølu

## Kia Carnival 2,9 Diesel 7 setur



**138.000,-**

Árg. 2000

**Útgjald einans kr. 28.000,-**
**Restina práta vit um**

LANDSINS LAGALIGASTA BRÚKTBILAFÍGGING

**Bilfríðkan á Hjalla**

TEL 35 73 00 · FARTEL 21 73 00
sí meira á WWW.BILFRIDKAN.FO

Sosialurin 341800

## Bátur til sølu



**4 mannafar, 11 mdr. Nýprísur 33.000,00**
**Til sølu fyri hægsta boð yvir 25.000,00**
**Vognur ikki íroknaður**

**Tlf 742002**

VINNUMÁLARÁÐIÐ

# Avloysari fyri leiðsluskrivara í barnsburðarfarloyvi

Vegna starvsfólk í barnsburðarfarloyvi verður søkt eftir leiðsluskrivara til Vinnumálaráðið at byrja 12. september 2005 og í uml. 12 mánaðir fram.

Arbeiði fevnir um:
- Landsstýrismannaskrivari
- Dagføringar av heimasíðuni
- Fyrifallandi skrivstovuarbeiði, t.d.
  - rættlestur
  - málsavgreiðsla
  - journal og postavgreiðsla

**Vit hugsa okkum, at tú hevur:**
- skrivstovuútbúgving ella aðra hóskandi útbúgving
- hollan kunnleika til føroyskt, danskt og enskt
- kunnleika til EDV á brúkarastøði
- góð samstarvsevni

**Vit bjóða:**
Eitt fjølbroytt og spennandi starv, sum tú sjálv/sjálvur verður við til at skapa, til tíðir strævið, men samstundis sera áhugavert og mennandi við góðum skeið- og eftirútbúgvingarmøguleikum.

**Lønar- og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Setanarøkið fevnir um Vinnumálaráðið og stovnar undir tí umframt Løgmansskrivstovuna og onnur stjórnarráð.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, viðmælum o.ø. verða sendar til:

**Vinnumálaráðið**
Postrúm 377
110 Tórshavn

og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi týsdagin 9. august 2005.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Vinnumálaráðið á telefon 35 60 60.

## MOTORSÚKKLA TIL SØLU



**Honda Gold Wing**
**Árg.1979**

**Prísur kr. 59.000**

**TLF 212407**

SJÓVAR KOMMUNA

# Kunngerð

### um framløgu av broytingum av byggisamtykt

Sambært løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954, um byggisamtykt og býarskipan við seinni broytingum, verður við hesum gjørt kunnugt, at uppskot til broytingar av byggisamtyktini fyri Sjóvar kommunu verður lagt fram til alment eftirlit á kommunuskrivstovuni frá 25. juli til 15. aug. 2005.

- 2. gr., ásetingar fyri A-økini, stk. 1 c verður broytt til: **Størsta loyvda byggistig er 0,6.**
- 3. gr., ásetingar fyri B-økini, stk. 1 f verður broytt til: **Hús mugu einans verða bygd í einari hædd við nýttari loftshædd og mugu ikki vera hægri enn 5 m til yvirgrind og 8,5 m. til mønu, mált frá miðaljørðildi (í miðal við húsahornini). Loftið í kjallara má ikki vera meira enn 1 m oman fyri hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallarahædd má vera.**
- 4. gr., byggihædd og fráleikar, stk. 9 b verður broytt til: **Bygningur má ikki, um hann er nærri enn 2,5 m frá grannamarki, vera hægri enn 3,5m.**
- 6. gr., ásetingar fyri E-økini, stk. 4 a verður broytt til: **Økið verður lagt av til bygging av kirkju og samkomuhúsi.**
- 6. gr., ásetingar fyri E-økini, stk. 4 b verður broytt til: **Loyvt er bert at reisa bygningar, sum tæna slíkum endamáli.**
- 9. gr., ásetingar fyri H-økið, stk a verður broytt til: **Loyvt er bert at byggja summarhús, sum standa fyri seg. Endamálið er at húsini bert verða nýtt til summarhús. Tað er bert loyvt at búgva í húsunum frá 1. apríl til 30. september. Uttan fyri hesa tíðarfesting mugu húsini bert nýtast í stytri tíðarskeið, feriu, vikuskifti og líknandi.**
- Partur av F1 við hondbóltsvøllin verður broytt til B
- Partur av J við Sjógv verður broytt til E2
- Partur av K - summarhúsøki á Selatrað - verður broytt til H

Møgulig mótmæli skulu vera skrivlig, og vera kommunustýrinum í hendi í seinasta lagi 25. okt. 2005.

**Sjóvar kommuna**
**Skúlavegur 10 · 490 Strendur**

# Gravarhjálp

*Marknagilsvegur 86 · 100 Tórshavn*
*Tel 311723 - 511723 · Fax 321722*
*herman@post.olivant.fo*

**Vit útinna allar uppgávur í sambandi við eina jarðarferð frá byrjan til enda**

- Eisini sangir, blómur og kransar
- Vit syrgja fyri sangarum *(í Tórshavn)*
- Vit framleiða okkara egnu kistur *(veita um alt landið)*
- Skipa fyri líkflutningi til og úr Føroyum
- Skipa fyri líkbrenning
- Hjá okkum kanst tú bestemma **tín síðsta vilja**

Sosialurin 341800